# Fiskivinnu- og samferðslumálaráðið

Dagfesting: 21-03-2024

**Uppskot til**

**Kunngerð
um
at landa alt lívfrøðiligt tilfar frá veiðu um bryggjukant í Føroyum**

Við heimild í § 34, stk. 2, nr. 3, § 40 og § 64, stk. 2 í løgtingslóg nr. 152 frá 23. desember 2019 um sjófeingi (Sjófeingislógin), sum broytt við løgtingslóg nr. 106 frá 29. juni 2020, løgtingslóg nr. 185 frá 18. desember 2020, løgtingslóg nr. 170 frá 21. desember 2021 og løgtingslóg nr. 155 frá 20. desember 2023, verður ásett:

*Virkisøki*

**§ 1.** Alt lívfrøðiligt tilfar frá veiðu í føroyskum sjógvi hjá fiskiførum undir føroyskum flaggi skal landast um bryggjukant í Føroyum.
*Stk. 2.* Undantikin er veiða til húsbrúks og veiða frá ferðavinnufiskiskapi sambært § 35, stk. 3 í løgtingslógini.
*Stk. 3.* Undantikin er veiða, sum ikki skal landast í Føroyum sambært § 41 í løgtingslógini.
*Stk. 4.* Undantikið er lívfrøðiligt tilfar av krabba.

**§ 2.** Lívfrøðiligt tilfar er alt av fiski so sum høvd, rogn, livur, ryggir, innvølur, skræða, fráskurður o.s.fr. Blóð er undantikið.

**§ 3.** Alt lívfrøðiligt tilfar skal landast samsvarandi kunngerð nr. 67 frá 16. mai 2012 um landingar og avreiðingar av fiski og fiskavørum.

*Skiftisreglur*

**§ 4.** Í hesum tíðarskeiðum skulu í minsta lagi ásettu mongdirnar í vekt av lívfrøðiliga tilfarinum fyri hvønn túr landast um bryggjukant í Føroyum:
a) 20% frá 1. juni 2024 til 1. juni 2025.
b) 30% frá 1. juni 2025 til 1. juni 2026.
c) 40% frá 1. juni 2026 til 1. juni 2027.
d) 50% frá 1. juni 2027 til 1. juni 2028.
e) 65% frá 1. juni 2028 til 1. juni 2029.
f) 80% frá 1. juni 2029 til 1. juni 2030.
g) 100% frá 1. juni 2030.

*Revsireglur*

**§ 5.** Brot á § 1, stk. 1 og § 4 verða revsað við sekt, er ikki harðari revsing ásett eftir aðrari lóg.
*Stk. 2.* Feløg og aðrir løgfrøðiligir persónar koma undir revsiábyrgd eftir reglunum í kapitli 5 í revsilógini.

*Gildiskoma*

**§ 6.** Henda kunngerð kemur í gildi dagin eftir, at hon er lýst. Samstundis verður sett úr gildi kunngerð nr. 183 frá 2017 og kunngerð nr. 2 frá 2023.

Fiskivinnu- og samferðslumálaráðið, dagfesting

**Dennis Holm**
landsstýrismaður

/ Elin Mortensen